


# Premier League er byrjað!

**Canal+ vísir flestu dystirnar úr heimsins mest væl dámdu fótbóltsdeild. Ungir og evnaríkir leikarar gera um seg og serliga er tað Ronaldo Cristiano, sum nógv eygu fylgja við.**



**Blackburn og Emerton**
Manchester United legði hart út í teirra ársins fyrsta Premier League dysti. Ein 4-0 sigur á Bolton Wanderers legði teir á næsta plássið aftaná Blackburn Rovers. Kappingin verður allarhelst eitt sindur javnari enn hini árini. Manchester United og Arsenal, eru tey bæði liðini sum tey seinastu níggju árini hava ligið í toppinum og stríðst um ovasta plássið.
Men Blackburn er liðið, sum legði harðast fyri í fyrsta umfarinum og fekk fimm mál í kassan hjá Wolverhampton, sum bara fekk tað eina málið. Avstralski miðvallaleikarin Brett Emerton fekk eina góða byrjan í sínum nýggja liðið. Stórar eru vónirnar og fleiri leikarar samanbera hendan unga avstraliumannin við David Beckham. Málmaðurin hjá Blackburn, Brad Friedel, er avgjørdur í at hesin er verdur tær 2.2 milliónir £ hann kostaði. "Hann kann skjóta eitt fríspark ella ein deyðbólt, eins og Beckham ger tað, tí hann skrúvar bóltin so nógv. Fyri ein og hvønn málmann er eitt tílíkt skot sera torfør at taka." Og sera væl hóskandi skoraði hann eitt mál og legði upp til eitt annað mál, sum hin nýggi leikarin á Blackburn Lorenzo Amoruso fekk.

**Nummar sjey hjá Manchester United: Christiano Ronaldo**
Men hvør er so maðurin, sum spælir í nummar sjey blusuni hjá Manchester United?
Hann er úr Portugal og eitur Cristiano Ronaldo, eftirnavnið er longu kent, so afturat í blusuni nummar sjey hevur hann nógv at liva upp til. George Best, Bryan Robson, Eric Cantona og so tann seinasti David Beckham eru stórspælararnir, sum hava spælt í nummar sjey.





Á heimasíðuni hjá teimum reyðu, stendur at sølan av David Beckham og Juan Sebastian Veron verður skjótt fyrigivin og gloymd um hetta verður framtíðin. Tey síðstu átta árini hevur Manchester United fingið 25 nýggj andlit inn. Hetta árið sær sera skilagott út við nýggju leikararunum David Bellion, Eric Djemba-Djemba, Tim Howard, Kleberson og so Cristiano Ronaldo. Alex er sera nøgdur við síðstnevnda leikaran, sum teir leingi hava verið áhugaðir í. Eftir dystin móti Sporting Lisabon, sum United tapti 3-1, varð tað avgjørt at hesin skuldi spæla við Manchester United.

Fergeson viðmerkti í sambandið við keypið: "Eftir tann dystin í umklæðingarrúminum tosaðu dreingirnir allatíðina um hendan leikaran og í flogfarinum eggjaðu teir meg til at keypa hann - so nógv halda teir um hann."
Áskoðararnir vórðu sera glaðir, tá Ronaldo kom inn í 71. minutti at leika sín fyrsta Premier League dyst fyri sítt nýggja lið. Tað rungaði av áskoðaraplássinum, "Tað er bara ein Ronaldo!", tá hann kom inn fyri Nicky Butt. Og tað var næstan sjón fyri søgn, tá hesin einans 18 ára gamli vísti sítt kvika stórspæl á Bolton hálvuni. Og eftir lítlari løtu hevði Ronaldo fingið eitt straffi fyri United, sum Van Nistelrooy, tó, ikki megnaði at seta í meskarnar. 18 ára gamli Ronaldo er avgjørt ein av leikararunum í Premier League, sum vert er at hava eyguni eftir.
7

## FAKTA

**Cristiano Ronaldo**
**Aldur:** 18 ár
**Hædd:** 1,84 m
**Vekt:** 75 kg
**Nummar:** 7
**Felag:** Manchester United
**Feløg:** Sporting Lisabon, hevur verið knýttur at Liverpool og Chelsea
**Tjóð:** Portugal
**Vanligt pláss á vøllinum:** Framherji
Keyptur fyri: 12.24 milliónir £

**Brett Emerton**
**Aldur:** ár
**Hædd:** 1,85 m
**Vekt:** 75 kg
**Nummar:** 23
**Tjóð:** Avstralia
**Felag:** Blackburn Rovers
**Øðrum feløgum:** AIS, Sydney Olympic og Feyenoord
**Vanligt pláss á vøllinum:** Verja/miðja
Keyptur fyri: 2.2 milliónir £





